# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Fróði Benjaminsen og Rasmus Nolsøe hava røkt miðverjusessirnar í tveimum dystum, og hetta hevur riggað avbera væl*

*Jógvan Martin Olsen*

# FM í estetiskum fimleiki fyri gentur

**Fríggjakvøldið verður føroyameistarakapping fyri gentur í estetiskum fimleiki. Umframt at vinna FM sleppur vinnandi liðið til stóra kapping í Finnlandi seinni í mars mánaði**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*



*Føroyameistarakapping fyri gentur í estetiskum fimleiki verður á skránni í høllini á Hálsi fríggjakvøldið. Luttakandi liðini eru frá Ljósinum, Havnar Fimleikafelag og Støkk*

*Mynd: Havnar Fimleikafelag.*

Fríggjakvøldið 2. mars verður føroyameistarakappingin fyri gentulið í estetiskum fimleiki. Ítróttarhølin á Hálsi í Havn verður karmur um kappingina, sum byrjar kl. 19:30. Liðini, sum fara at kappast, eru frá Ljósinum, Støkk og Havnar Fimleikafelag. Umframt kappingarliðini fara gestalið frá Yndi eisini at framføra. Frásøgufólk til kappingina verður Karina Nolsøe.

Hetta er triðja árið, at Føroya Fimleikasamband skipar fyri kappingum í estetiskum fimleiki, og sigast kann ikki annað enn, at tað er eitt ótrúliga stórt arbeiði, ið er gjørt hetta tíðarskeiðið. Fimleikararnir venja nú upp til fimm ferðir um vikuna, umframt at tær eisini hava "heimavenjingar".

Alt hetta arbeiðið og harða venjingin sóust væl aftur í steypakappingunum, sum vóru í Klaksvík í januar mánaði. Støðið er hækkað ómetaliga nógv, og tað sæst, at fimleikararnir veruliga vilja nakað.

Fimleikasambandið ynskir, at enn fleiri kappingar verða í framtíðini, soleiðis at bæði fimleikarar og dómarar fáa enn meira burtur úr nógva arbeiðinum, sum longu er lagt í estetiska fimleikin, so tað verður spennandi at vita, hvat fer at henda framyvir.

Umframt at vinna føroyameistaraheitið, fær vinnandi liðið eisini høvi til at fara til eina altjóða kapping í estetiskum fimleiki, sum verður í Finnlandi 23. og 24. mars. Dómararnir eru eisini spentir at royna seg. Fleiri dómarar hava bert dømt eina kapping frammanundan, og tveir dómarar skulu eisini til Finnlands at døma í somu kappingini, sum er nevnd omanfyri.

Tvær aðrar kappingar í estetiskum fimleiki verða aftaná hesari komandi tíðina. Í apríl verður ein B-kapping í ítróttarhøllini í Runavík, og 5. mai verður FM-kappingin fyri kvinnur, smágentur og pinkur. Undanfarnu árini hava hallirnar verið fullsettar við áskoðarum, og FFS vónar eisini at síggja nógv fólk til komandi kappingarnar.

Dyrnar í ítróttarhøllini lata upp ein tíma, áðrenn kappingin byrjar, soleiðis at áskoðararnir kunnu finna sær pláss í góðari tíð. Atgongumerkini til kappingina kosta kr. 80,- fyri vaksin og kr. 10,- fyri børn.

## Støðan í 1. deild

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bogi Simonsen | 149 |
| 1 | Alolan Dal-Christiansen | 149 |
| 3 | Símin Lassaberg | 135 |
| 4 | Høgni Jacobsen | 105 |
| 5 | Marjun Restorff | 100 |
| 6 | Hallur Ellingsgaard | 69 |

**Støðan í 2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jórun Johannesen | 162 |
| 2 | Óli Holm | 140 |
| 3 | Heðin Mortensen | 128 |
| 4 | Danny Danielsen | 121 |
| 5 | Jákup Egholm | 76 |
| 6 | KBI | 84 |

**Multihold**

Multihold er ein útrokning, ið verður gjørt, har ein áleið kann síggja hvussu tey einstøku pørini hava staðið seg.

**1.Deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Heðin Mouritsen – Jóannes Mouritsen | 18,20 |
| 2 | Bogi Simonsen – Hallberg Arnfríðsson | 17,29 |
| 3 | Dia Jacobsen – Eyðun Anthoniusen | 17,05 |
| 4 | Rói á Rógvu Joensen – Hans Jacob Petersen | 16,59 |

**2.Deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Oddmar Danielsen – Einar Ellingsgaard | 18,33 |
| 2 | Dia Poulsen – Óli Holm | 17,90 |
| 3 | Henriette Svendstrup – Jórun Johannesen | 16,75 |
| 4 | Inga Ellingsgaard – Ingibjørg Hansen | 16,19 |

## Spenningur í 1.deild

**Trý umfør í liðkappingini í Bridge vórðu leikt í Bridgehúsinum í Havn um vikuskiftið**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Í 1.deild er spenningurin stórur. Liðið hjá Boga Simonsen, ið undan dystinum móti Allan Dal- Christiansen, greitt lá á odda, snávaði í toppdystinum móti júst Allan. Vælleikandi liðið hjá Allan vann sannførandi 21-9.

Liðið hjá Símin Lassaberg hevði eisini eitt gott vikuskiftið, teir vunnu tveir dystir við 25 og taptu tepurt móti Boga Simonsen.

Trý lið kappast um at vinna 1.deild. Liðið hjá Allan Dal-Christiansen hevur nú sama stigatal sum liðið hjá Boga Simonsen, meðan liðið hjá Símin Lassaberg liggur á triðja plássið, ikki langt aftanfyri.

Seinastu tvey umførini verða leikt í Vági 16. og 17. mars.. Tann mest spennandi dysturin verður nokk dysturin millum liðið hjá Allan og Símin, ið skulu møtast í næst seinasta umfarinum. Um liðið hjá Símin skal gera sær vónir um at vinna 1.deild er tað eitt treyt, at teir vinna móti Allan.

Liðið hjá Boga skal fyrst møta liðinum hjá Høgna Jacobsen, ið hevði eina góða byrjan upp á kappingarárið.

**2.Deild**

Í 2.deild hevur liðið hjá Jórun Johannesen lagt seg greitt á odda.

Liðið hjá Óla Holm, ið annars hevur ligið á odda í 2.deild, er tað einasta liðið, ið hevur møguleika at hótta Jórun. Møguleikin hjá liðinum hjá Heðin Mortensen um uppflyting glapp, tá ið teir taptu mótí Jórun um vikuskiftið.

Á liðinum hjá Jórun Johannesen eru umframt Jóruna sjálva eisini, Johannis Skaarup, Oddmar Danielsen, Einar Ellingsgaard, Henriette Svendstrup og Bjørg Róin.